## Álvarsamir arbeiðsskaðar í Havn

**Tveir mans duttu av einum byggipalli seinnapartin hósdagin. Báðir fingu álvarsama skaða. Á Norrønu misti ein maður vitið, tá ein talja loysnaði.**

ARBEIÐSSKAÐAR

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tveir timburmenn í Havn vóru so óhepnir at detta av byggipallinum, meðan teir seinnapartin hósdagin umvældu eini hús í Jákup Nolsøe gøtu. Fallið var góðar seks metrar og báðir fóru á landssjúkrahúsið.

Av løgreglustøðini í Havn verður sagt, at annar maðurin breyt báðar hælarnir, meðan hin breyt annan hælin og koykti ein rygggeisla. Maðurin, sum breyt báðar hælarnar, varð fríggjamorgunin sendur niður á Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn. Arbeiðseftirlitið kannar nú málið gjøllari.

### Taljan loysnaði

Á Norrønu var eisini ein arbeiðsskaði hósdagin. Menn vóru í ferð við at spenna eina talju, tá hon brádliga loysnaði. Ein maður fekk taljuna í nakkan og varð alt fyri eitt fluttur á Landssjúkrahúsið. Av løgreglustøðini í Havn verður sagt, at maðurin er við vit aftur, og at Skipaeftirlitið kannar nú málið.

## Ferðaseðlasølan gongur betri enn í fjør

Í dag byrjar summarsiglingin hjá Norrønu. Fyrsti túrur er úr Hanstholm til Føroya. Við nýggjum stásiligum skipið hevði Smyril Line eina framgongd upp á góð 30% í summarsiglingini í fjør sammett við undanfarin ár.

Stjórin á Smyril Line, Óli Hammer, sigur, at sølan av ferðaseðlum til summarsiglingina í ár gongur væl. –Tað er talan um eina framgongd sammett við í fjør, men tú fært meg ikki at siga, hvussu stóra framgongd talan er um, sigur Óli Hammer.

*-páll*

## Álit um rækjuflotan handað Bjørn Kalsø

Undanmaðurin hjá Bjørn Kalsø, Johan Dahl, setti í januar-mánað ein skjótt arbeiðandi bólk at gera eitt álit um støðuna í kreppurraktu rækjuvinnuni og hvussu vinnan skal skipast í framtíðini.

Bólkurin er nú liðugur við arbeiðið, og hósdagin fekk landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum álitið um rækjuflotan. Við Dimmalætting sigur Sólja í Ólavsstovu, deildarleiðari í Fiskimálaráðnum, at Fiskimálaráðið fer ikki at kunna um innihald í álitinum fyrr enn týsdagin.

*-páll*

# Porno gav mær frælsi

**Hon orkar ikki fyri tí borgarliga lívinum, og tí valdi hon at gerast pornostjørna. Um vikuskiftið vitjar fyrrverandi heimskenda pornostjørnan, Katja Kean, í Føroyum**

KATJA K. VITJAR

*Páll Holm Johannesen,*
*pall@sosialurin.fo*



Í Føroyum er ikki loyvt at selja pornografiskan lesnað ella filmar. Kortini bendir nógv á, at føroyingar kennast við navnið Katja Kean.

Katja Kean varð fødd á Frederiksberg í 1968. Hon vaks upp í Avedøre í sjeyti- og áttatiárunum, og sum 27 ára gomul gjørdi hon av at royna seg í pornofilmi. Í sjálvævisøguni, sum varð nógv umrødd og seld í Danmark fyri smáum tveimum árum síðani, greiðir Katja Kean frá, at hon undir upptøkunum av fyrsta pornofilminum í Malmø í 1996 varð doypt fyri aðru ferð.

Navnið, Katja Kean, varð eitt navn, sum skuldi koma at ekkóa innan pornovinnuna nógvu næstu árini. Við rúkandi ferð vann hon seg fram millum fremstu pornomodellir í heiminum, og hennara avrik á filmi vóru rættiliga væl umtókt millum tey, sum hava áhugað fyri slíkum filmum.

Kortini gjørdist lívsleiðin sum pornomodell stokutt, og í 2000 gjørdi hon av at gevast. Í dag er Katja Kean mest kend sum skrivstovukvinnan, Lisa, í væl umtokti sendiróðini, Langt fra Las Vegas.

Um vikuskiftið vitjar Katja Kean oyggjarnar. Fríggjakvøldið skal hon verða gestabarrvørur á Eclipse, og um vikuskiftið er ætlanin, at hon skal ferðast runt oyggjarnar, so hvør veit um ikki onkur gamal drongur á bygd fer at renna seg inn í sín lívs kærleika ein av døgunum.

### Søkir avbjóðingar

-Eg havi ongantíð veruliga hvílt í mær sjálvum og eg leitaði altíð eftir nýggjum avbjóðingum. Í 1996 hevði eg hug at royna meg í einum nýggjum umhvørvi og tað varð so innan pornoídnaðin, svarar Katja Kean, tá hon verður spurd, hvør orsøkin var, at hon valdi at royna seg sum pornomodell.

Hon greiðir frá, at hon ongantíð hevði ætlanir um at verða partur av einum vanligum borgarligum lívi, tí tað borgarliga lívið er ein avmarking av møguleikum, sum lívið hevur at bjóða

-At liva sum pornostjørna gav eitt ávíst frælsi frá tí vanliga lívinum. Eg slapp at ferðast, liva lívið og vinna eina rúgvu av pengi, greiðir Katja Kean frá.

Millum manna eru skoðsmálini til fólk, sum arbeiða innan pornoídnaðin, alt annað enn góð. Í sjálvævisøguni greiðir Katja Kean frá, at hon heldur, at fólk eiga at verða tollynt, tá tað kemur til pornoídnaðin.

-Tað eru ein rúgva av fordómum um fólk í pornoídnaðinum. Porno verður av fleiri framvegis mett at verða hálvgum kriminelt. Í mínum føri setti eg eitt mark alt fyri eitt og eg kom tískil ongantíð í óførið. Eg vil ikki beinleiðis verja vinnuna, men eg eri so eitt dømi um, at tú kanst vera í vinnuni, uttan at taka skaða av tí, vísir Katja Kean á.

### Steðgar á tindinum

Eftir 30 pornofilmar og fleiri heiðurslønir fyri síni avrik á lakinum gevst Katja Kean brádliga í 2000 í pornovinnuni. Hon kennir tað seg hava rokkið síni mál innan pornovinnuna. Innan góð trý ár vinnur Katja Kean seg fram millum fremstu pornostjørnurnar í heiminum og tá hon kemur á tindin, tímir hon ikki meir

-Lívið sum pornostjørna var ikki spennadi longur. Eg setti mær nøkur mál, og tey rakk eg. Áhugin fyri porno var eisini dalandi, og tí gavst eg, sigur hon

Lívið sum pornostjørna hevur Katja Kean lagt aftur um seg. Spurd um hon angrar, at hon gjørdi av at gerast pornostjørna, svarar hon avgjørd, at tað ger hon als ikki

-Tað kann onkuntíð kennast eitt sindur undarligt at síggja seg sjálvan í sølubúðunum, men eg angri einki. Hasin partur av mínum lívi hoyrir fortíðini til, sigur hon.

### Undirklæðir

Seinastu trý árini hevur Katja Kean verið við væl umtóktu sendirøðini, Langt fra Las Vegas við Casper Christensen á odda. Hon hevur leiklutin sum skrivstovukvinnan Lisa.

-Leikluturin í sendirøðini kom ógvuliga væl við. Sendirøðin gjørdi sítt til, at eg ikki varð stemplað eftir eg gavst í pornoídnaðinum, tí fólk kunnu síggja meg í einum øðrvísi leikluti, sigur Katja Kean.

Í vár vóru seinastu sendingarnar við Langt fra Las Vegas gjørdar og Katja Kean er longu farin undir næstu verkætlanina. Á jólum verður hon á marknaðinum við undirklæðum við undirheitinum Katja K.



Høgni Hoydal:

# ES ella loysing

**Sambært formanni Tjóðveldisfloksins er sannleikans tími komin fyri føroysku tjóðina, nú nýggja ES grundlógin flytir málsøki, danir umsita vegna føroyingar, til ES háborgina í Bruxelles. – Uttan fullveldi og nakran sjálvsavgerarrætt verður føroysku tjóðin drigin inn í ES, og tað sindri av fólkaræði, vit enn hava, hevur ongantíð verið í størri vanda, sigur Høgni Hoydal**

ES

*Heini í Skorini,*
*heini@sosialurin.fo*



Formaður Tjóðveldisfloksins rópar av álvara varskó, nú nýggj ES grundlóg er á veg, sum danir eftir øllum at døma vera partur av. Ikki orsakað av grundlógini, men orsakað av teimum avleiðingum, hetta fær fyri Føroyar. Fleiri og fleiri donsk felagsmál verða væntandi flutt til ES at umsita, og av tí at danir enn umsita fleiri málsøki vegna okkum føroyingar, verður føroyska tjóðin – uttan at verða spurd – automatiskt umsitin úr ES háborgini í Bruxelles.

Uttanríkismál, rættarmál, gjaldoyramál og verjumál eru í løtuni málsøki, danir umsita vegna føroyingar, og um t.d. hesi mál verða útdelegera til ES, er stóri spurningurin fyri Høgni Hoydal, hvørjar avleiðingar hetta fær fyri Føroyar.

### Tvinnir eru kostirnir

- Vit eru fyrst og fremst alt ov seinir á sjóvarfallinum at viðgera henda spurning, tí hetta er í veruleikanum størsti fólkaræðisligi spurningurin og trupulleikin fyri føroysku tjóðina í nýggjari tíð, sigur Høgni Hoydal. Hann vísir á, at tvinnir eru kostirnir.

- Uttan ræði á egnum landi fylgja vit við dønum inn í ES samstarvið og gerast ein dupultur útjaðari bæði í ríkisfelagsskapinum og í Europasamveldinum, ella mugu vit loysa og harvið fáa møguleikan sjálvi at velja, í hvønn mun vit vilja luttaka, sigur Høgni Hoydal.

Formaður Tjóðveldisfloksins vísir á absurda og mótstríðandi trupulleikan, t.d. Sambandsflokkurin hevur í sínum grundgevingum fyri ES.

- Skulu vit vera partur av europeisku integratiónsprosessini, er tað fyrst og fremst ein fortreyt, at vit hava ognað okkum tjóðarfrælsi, tí uttan fullveldi gerast vit bert partur av ES gjøgnum Danmark, og tá er fólkaræði av álvara í vanda, vísir Høgni Hoydal á. Á henda hátt mangla vit sambært honum at taka grundleggjandi stigið, sum yvirhøvur ger okkum før fyri at avgera, hvussu vit skulu fyrihalda okkum til ES.

Høgni Hoydal heldur, at kjakið um ES higartil hevur verið merkt av naiviteti, tí uttan sjálvsavgerarrættin kunnu føroyingar á ongan hátt gerast ES limir, og tískil verður tað bert ígjøgnum danir og sum útjaðari í danska ríkinum, vit gerast partur av ES samstarvinum.

- Talan er í veruleikanum um eina absurda støðu. Hvussu skulu danir lata ES umsita t.d. gjaldoyramál og uttanríkismál, samstundis sum teir skulu umsita somu mál vegna okkum, spyr Høgni Hoydal. Hann vísir við spurninginum á, at antin kemur ES at umsita mál vegna okkum, ella yvirtaka vit sjálvi málsøkini.

### Drukna í altjóðagering

Høgni Hoydal ber ótta fyri, at føroysku sambandsflokkarnir ikki fara at taka henda trupulleika í nóg stórum álvara.

- Um vit vegnu donsku ES luttøkuna verða drigin við inn í eitt ES samstarv, er tað seinasta sindri, vit hava av fólkaræði, av álvara í vanda, heldur Høgni Hoydal. Formaður Tjóðveldisfloksins sigur, at okkara leiklutur verður á sama støði sum ein dansku landslutur, og sostatt koma vit ikki til orðanna og drukna í globaliseringini millum stórveldini í ES.

- Uttan sjálvsavgerðarrættin hava vit ikki hægri status enn hetta, og so kunnu vit enda sum fleiri bretsk kreppurakt oyggjasamfeløg við sera høgum arbeiðsloysi, slær Høgni Hoydal fast.

Hann vísir á Hetland, Orknoyggjarnar og fleiri skotskar fiskivinnubýir á meginlandinum, sum hava verið raktir av júst hesum, og sum í dag einki ræði og ongan rætt hava í Europasamveldinum.

- Tí mugu vit tryggja okkum tjóðarfrælsi, um vit ikki skulu enda sum ein gloymdur útjaðari í Europasamveldinum, slær Høgni Hoydal fast.

### Føroyar uttanfyri EBS

Uttan stórvegis úrslit arbeiddi undanfarna samgonga fyri betri føroyskari atgongd í innara marknaðinum í ES, men sambært Høgna Hoydal var sjón fyri søgn, at okkara rættindi sum partur av Danmark er avmarkaður. EBS avtalan (europeiska búskaparliga samstarvið) krevur nevniliga, at luttakandi londini hava tjóðarfrælsi.

- Bæði Noreg og Ísland eru partur av innara marknaðinum uttan at vera ES limir, men Føroyar lúkaðu ikki treytirnar at luttaka í EBS avtaluni, vísir Høgni Hoydal á. Skulu vit tí luttaka í einum alt meiri globaliseraðum og tætt samanknýttum Europa, har nationalstaturin fánar í kjalarvørrinum av einum europeiskum samveldi við einari felags stjórn, mugu vit sambært Høgna Hoydal fyrst yvirtaka tey málsøki, sum enn eru felagsmál.

### Krevja fólkaatkvøðu

Tjóðveldisflokkurin krevur tí eina fólkaatkvøðu, so staðfestast kann, hvat fólkið vil viðvíkjandi ES spurninginum. Um einki verður gjørt, er vandi sambært Høgna Hoydal fyri, at vit enda í einum samstarvi, vit als ikki hava valt at luttaka í, har Føroyar – so hvørt sum danir lata lata frá sær sín suverenitet til ES – uttan ávirkan verða stýrdar úr Bruxelles.

- Hetta er tí størsti føroyski fólkaræðisligi spurningurin í nýggjari tíð, slær andstøðuleiðarin Høgni Hoydal fast.

Kaj Leo Johannesen:

# Fólkið skal avgera ES spurningin

**Formaður Sambandsfloksins gleðir seg til hol verður sett á ES kjakið í Føroyum í kjalarvørrinum av nýggju ES grundlógini, danir væntandi taka undir við. – Hóast felagsmál møguliga verða flutt úr Keypmannahavn til Bruxelles, er talan um eina framhaldandi menning í ríkisfelagsskapinum uttan nakran vanda fyri føroyska fólkaræðið, sigur Kaj Leo Johannesen. Hann undirstrikar, at føroya fólk skal avgera ES spurningin**

ES

*Heini í Skorini,*
*heini@sosialurin.fo*



- Eg varð glaður at lesa viðmerkingar løgmans í Sosialinum í gjár, tá løgmaður bað føroyskar politikarar fyrireika seg til kjak um avleiðingarnar av eini ES grundlóg, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins.

Tað er eingin loyna, at eitt aðalendamál hansara í politiska yrkinum hevur verið tættari samstarv við ES, og hevur hann eisini sett hol á kjakið fyrr á politiska leikpallinum við fyrispurningum um ES.

### ES grundlógin broytir einki

- Eg gleði meg til kjakið, tí Føroyar vera sjálvsagt ávirkaðar av integratiónsgongdini í Europa í løtuni, og tí mugu vit gera okkum greitt, hvat vit vilja, heldur Kaj Leo Johannesen. Meðan Høgni Hoydal úr Tjóðveldisflokkinum ávarar møguligar avleiðingar, um danir taka undir við eini ES grundlóg og flyta felagsmál í heimastýrislógini úr Keypmannahavn til Bruxelles, sær Kaj Leo Johannesen á ongan hátt vandar, sum kunnu seta fólkaræðið føroyinga í vanda.

- Einasta fyrisitingarliga broytingin er geografisk, at danir møguliga koma at umsita føroysk mál úr Bruxelles, og tí er einki óttast, heldur nýklakti formaður Sambandsfloksins.

Kaj Leo vísir á, at danska grundlógin ikki verður broytt við einum komma, hóast nýggj ES grundlóg verður samtykt, og tískil er talan um framhaldandi føroyska funktión í einum mentum ríkisfelagsskapi.

Formaður Sambandsfloksins undirstrikar mótvegis tjóðveldismótstøðumonnum hansara eisini, at føroyingar hava fullan avgerarrætt sum partur av ríkinum, og at tað er íspunnið tvætl, at fullveldi má fáast í lag til tess at luttaka í europeisku integratiónsgongdini.

- Vit kunnu í prinsippinum melda okkum inn í ES sum partur av ríkinum nær sum helst, og einastu avmarkingarnar er nationali yvirvaldsrætturin, vísir Kaj Leo á.

### Nationalstaturin revurderast

Kaj Leo Johannesen sigur, at týdningurin av nationalstatinum í einum alt meiri integreraðum og savnaðum Europa eigur at vera revurderaður av føroyingum, og sjálvur er hann ikki í iva um, at ES einki er at ræðast.

- Um danir velja at flyta nøkur málsøki til ES at umsita, er tað tí, teir eru tryggir við hesum, og eg óttist á ongan hátt avleiðingarnar av hesum fyri føroyingar, sigur Kaj Leo. Hann heldur, at talan er um vinnuligar, handilsligar, uttanríkispolitiskar og trygdarpolitiskar fyrimunir við einum tættari ES samstarvi, og um vit á henda hátt gerast størri partur av samstarvinum, tænir hetta føroysku tjóðini.

Kaj Leo sigur, at við tveimum føroyskum umboðum í danska fólkatinginum hava vit føroysk umboð og allar møguleikar at fylgja við í gongdini, og við hesum fólkatingslimum umframt einum kjaki í Føroyum kunnu vit fyrireika okkum til sjálvi at taka støðu uttan automatiskt at verða drigin við "ígjøgnum bakdyrnar", sum Høgni Hoydal hevur víst á.

Formaður Sambandsfloksins vísir í hesum sambandi á, at Føroya fólk til eina og hvørja tíð skal avgera, í hvønn mun vit skulu luttaka í ES høpi.

- Mótvegis Tjóðveldisflokkinum, sum ikki tordi at spyrja Føroya fólk á sinni, eru vit ikki bangnir at spyrja føroyingar um sína meining viðvíkjandi ES á fólkaatkvøðu, men hetta er nokk longri frammi í tíðini, slær sambandsformaðurin fast.

### Einføld grundlóg

ES grundlógin er sambært Kaj Leo ein roynd at savna allar tær traktatir, sum higartil eru gjørdar, og sostatt verða spælireglurnar einfaldari við eini felags grundlóg. Hetta er sambært honum eitt framstig fyri europeisku gongdina og integratiónina, og sigur hann, at við eiga at fyrihalda okkum realistisk til altjóða gongdina.

- Taka vit Tjóðveldisflokkin, so vil hann ikki vera partur av ríkisfelagsskapinum, og hann vil heldur ikki vera partur av ES. Vit mugu tí spyrja okkum, hvat Tjóðveldisflokkurin í veruleikanum vil, og í hvønn mun hann ynskir at luttaka í altjóða samfelagnum, sigur Kaj Leo Johannesen, sum heldur vil vera partur av integratiónsgongdini og samveldinum við støði í teimum fyrimunum, vit fáa í tættari samstarvi við ES.